Búskapur og vinna:

Kvinnur betri

Ein norsk kanning vísir, at fyritøkur, sum hava kvinnur í nevndini, klára seg betri fíggjarliga enn tær fyritøkur, sum bara hava menn í nevndini. Tey, sum hava gjørt kanningina fyri handilsháskúlan í Bergen, siga, at munurin kemst neyvan av, at kvinnurnar í nevndunum eru skilabetri enn menninir, men tey halda, at kvinnur yvirhøvur duga betur at síggja nýggjar møguleikar og at nýta teir.

Annars vísir kanningin, at kvinnurnar eru ikki serliga væl umboðaðar í norska vinnulívinum. Bara 28 prosent av fyritøkunum hava eina ella fleiri kvinnur í nevndini.

Færri flúgva

Talið á teimum, sum ferðast um flogvøllirnar í Íslandi, var nóg minni í januar í ár enn í sama mánað í fjør. Tey, sum flugu millum Ísland og umheimin, vóru 2,9 prosent færri í tali í januar í ár enn í januar í 2001, meðan talið á teimum, sum millumlendu í Íslandi á veg um Atlantshavið, var heili 34 prosent minni.

Matur dýrur

Sviar kæra seg um, at matvørurnar eru ov dýrar. Atfinningarnar hava verið so nógvar í seinastuni, at stjórnin í Stockholm hevur nú gjørt av at gera nakað við trupulleikan, samstundis sum ætlanin er at kanna kappingarviðurskiftini hjá matvøruhandlunum.

Svenska kappingarráðið er komið eftir, at sviar rinda 20 prosent meiri fyri mat enn fólk í hinum ES-londunum, og sambært ráðnum kemst helmingurin av hesum muni av vantandi kapping millum handlarnar.

Men svensku brúkararnir hava okkurt at gleða seg til. Týska matvøruketan Lidl ætlar at byggja handlar í hundrað svenskum kommunum, og tað fer væntandi at geva svensku matvøruhandlunum nakað at hugsa um, skrivar Aftonbladet.

UTTAN ÚR HEIMI

Friðarvónin druknað í kúluroki

Ísraelsk hernaðarakfør á veg inn í flóttafólkaleguna Balata í býnum Nablus

Fyri fyrstu ferð, síðani ófriðurin í Miðeystri byrjaði í september í 2000, hevur ísraelski herurin hersett heilar palestinskar flóttafólkalegur.

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

Bert fáar tímar eftir at ísraelska stjórnin hevði sagt seg vera sinnaða at tosa við saudiarabiska krúnprinsin ella embætismenn hansara um tað nýggja friðaruppskotið, eru útlitini fyri einari loysn á kreppuni skotin langt burtur, eftir at ísraelski herurin hevur hersett tvær palestinskar flóttafólkalegur.

Palestinski trygdarovastin, Jibril al-Rajoub, segði í gjár, at tað seinasta ísraelska átakið hevur eittans endamál, og tað er beina fyri øllum royndum at fáa frið í lag.

Fyri nøkrum vikum síðani hersetti ísraelski herurin í palestinska býin Tulkarem, men hermenninir fóru ikki inn í flóttafólkaleguna í býnum. Mannarættindafelagsskapir hava eisini mælt Ísrael frá at søkja at teimum palestinsku flóttafólkalegunum, tí í tílíkum álopum er stórur vandi fyri, at ósek sivilfólk lata lív. Soleiðis varð eisini, nú Ísrael hersetti flóttafólkalegurnar við Jenin og Nablus. Tíggju palestinar og ein ísraelskur hermaður lógu eftirá. Við teimum hava 1006 palestinar og 288 ísraelsmenn latið lív, síðani ófriðurin byrjaði tann 28. september í 2000.

Ísraelska herleiðslan sigur, at víðgongdir palestinar nýta flóttafólkalegurnar sum skjól, og at tað tí var neyðugt at herseta tær báðar legurnar. Politiska andstøðan í Ísrael er ikki samd við herleiðsluni. Andstøðuleiðarin, Yossi Sarid, segði í gjár, at hersetingin var tann reini ørskapur.

Ísraelski mannarættindafelagsskapurin BTselem, sum verður roknaður at vera rættiliga óheftur í stríðnum millum ísraelsmenn og palestinar, sigur, at sum er er torført at fáa eygað á nakra vón um frið, heldur tvørturímóti.

Nixon ætlaði at nýta kjarnorkubumbu

Á einari bandupptøku, sum almenningurin nú hevur fingið atgongd til, hoyrist, at Richard Nixon ætlaði at tveita eina kjarnorkubumbu niður yvir Norðurvietnam í 1972

USA
Árni Joensen

Bandupptøkan er ein samrøða millum Richard Nixon, forseta og fremsta trygdarpolitiskaráðgeva hansara, Henry Kissinger. Á bandinum sigur Nixon, at hann vil sleppa at tveita eina kjarnorkubumbu niður yvir Norðurvietnam.

- Eg vil heldur nýta kjarnorkubumbuna, og eg leggi einki í, um sivilfólk doyggja av amerikanskum bumbum, sigur Richard Nixon á bandinum, men Kissinger mælir forsetanum frá at taka eitt so ógvusligt stig.

Bandið av samrøðuni millum teir báðar er bert eitt av umleið 500 bondum, sum amerikanski almenningurin nú hevur fingið atgongd til. Millum hini bondini, sum viðvíkja forsetatíðini hjá Richard Nixon, eru upptøkur í sambandi við vitjan forsetans í Kina, seinasta árini av Vietnam-kríggnum, Watergate-gøluni og spurningnum um, hvør skuldi taka við sum ovasti í FBI eftir tann máttmikla J. Edgar Hoover.

Amerikanskir eygleiðarar siga, at bandupptøkurnar frá forsetatíðini hjá Nixon fara uttan iva at vátta uppfatanina av Richard Nixon sum einum forseta, sum legði seg eftir at nýta sítt vald til fulnar, sama um framferðin var løglig ella ikki, og at hann legði lítið í, at onnur gjørdust offur fyri framferð hansara.

Úr Norðurlondum:

Velja kortini

Í Noregi hava politikarar og onnur rópt varskó, tí seinastu árini hava alt ov fáir norðmenn verið á vali, tá stórtingsval hevur verið, men nú vísir ein nýggj bók, at tað eru fáir veljarar, sum sita heima fleiri val á rað.

Kanningin í bókini umfatar tey trý stórtingsvalini frá 1989 til 1997, og hon vísir, at tað var bara eitt prosent av veljarunum, sum sótu við hús allar tríggjar valdagarnar. Áhugin fyri kommunuvalunum er nakað minni. 12 prosent av veljarunum vóru ikki á kommuvali í 1995 og heldur ikki í 1999.

Kunnu arbeiða

Danski ráðharrin í innflytaramálum, Bertel Harder, hevur nú gjørt av, at útlendingar, sum bíða eftir at fáa uppihaldsloyvi í Danmark, kunnu sleppa til arbeiðis í bíðitíðini.

Tað hevur ikki borið til fyrr, men í seinastuni hevur ráðharrin fingið fleiri áheitanir um at lata tey bíðandi sleppa til arbeiðis, tí í nógvum førum er talan um fólk við góðari útbúgving, og sum tørvur er á á danska arbeiðsmarknaðinum. Her verður m. a. hugsað um læknar, verkfrøðingar og fólk við KT-útbúgvingum.

Ferjueldur

Norska ferjan "Prinsesse Ragnhild" noyddist at leggja stilt í Kattegat fríggjanáttina, tí eldur var í maskinrúminum. Ferjan, sum var á veg úr Oslo til Kiel í Týsklandi, var støddsunnan fyri donsku oynna Anholt, tá menn varnaðust eldin.

Danska sjóverjan hevði eitt av sínum skipum á staðnum, men tað eydnaðist norsku manningini at sløkkja eldin, og "Prinsesse Ragnhild" helt síðani leiðina fram. 965 ferðafólk vóru við skipinum umframt manningina, sum taldi 160.

Laksaát

Ein norskur meistarakokkur borðreiddi við forkunnugum laksarættum til føroyskar alarar, ið vóru á skeiði. Føroyskur laksur stendur einki aftanfyri laksin uttanlands, sigur kokkurin, sum eisini er á norska kokkalandsliðnum. Væl smakkaði

–Støðið í Føroyum er sum í Oslo. Tað er kanska eitt sindur meira gammeldags í Føroyum og lítið fjøllbroytt, men tað er gott, sigur Kjetil Gundersen, sum hósdagin borðreiddi við alskyns laksarættum til føroyskar alarar.
Mynd: Heri á Rógvi

LAKSUR
Heri á Rógvi

Tað er mest tann roykti laksurin upp á breyð ella kanska feski laksurin í ovninum, sum føroyingar kenna best, men tað eru alskyns rættir, ið kunnu fáast burturúr laksinum.

Hósdagin fingu nakrir føroyingar í øllum førum møguleikan til at smakka laks tilgjørdan á nógvar ymiskar mátar.

Tað var í sambandi við eitt skeið fyri alarar, ið Skrætting skipaði fyri saman við Aquasamart, at boð vórðu send eftir einum norskum meistarakokki. Á skeiðnum vóru um hálvtrýs luttakarar. Hesir fingu so allir saman við umboðum frá fjølmiðlunum høvi til at royna nakrar, á okkara leiðum, øðrvísi laksarættir.

Eitt sjálvtøkuborð varð við bæði heitum og køldum laksarættum. Laksur var berandi røðvaran í øllum teimum ymsu rættunum. Rættirnir spentu seg rættiliga víða. Millum tey mest forkunnugu um okkara leiðir var japanski rætturin sushi. Av øðrum rættum kunnu nevnast laksapaté og ein rættur við nudlum og laksi. Tað skal sigast, at maturin smakkaði ófør væl, og tað kendist eisini sum øllum dámdi ófør væl. Luttakararnir vóru eitt sindur trekir við at fara at fáa sær í fyrstuni, men tá gongd kom í varð mestsum ikki steðga á aftur. Aftur við góðu laksarættunum var okkurt gott drekkandi, harímillum eisini saki, ið er japanskt rísvín. Luttakararnir vóru á einum máli um, at hetta vóru frálika góðir rættir, ið teljast millum tær meira forkunnugu rættirnar um okkara leiðir. Hóast tað, so varð allur laksurin, ið varð nýttur, føroyskur. Tað var eitt lítið samdøgur síðani, at laksurin varð slaktaður, og hetta er á markinum, tí laksurin skal, sambært norska meistarakokkinum, hava verið slaktaður minst eitt samdøgur undan at hann verður hagreiddur til matvøru.

Leskiligt sær tað út, og tað smakkaði eisini óført. Eitt veruligt laksagildi.
Mynd: Heri á Rógvi

Á landsliðnum

Norski meistarakokkurin, sum stóð fyri laksarættunum á Hotel Føroyum hósdagin, eitur Kjetil Gundersen. Hann starvast hjá Gastronomisk Industry í Oslo. Gastronomisk Industry hevur kokkar, ið ferðast kring allan heim fyri at læra seg at gera fleiri og meira spennandi rættir.

Sjálvur arbeiðir Kjetil sera nógv við laksi sum ráðvøru, og hann móttekur eisini uppskriftir og impulsir úr øllum heiminum. Sjálvur ferðast hann mest í Norðurevropa, og nú er hann eisini komin hendavegin.

–Ætlanin er fyrst og fremst at vísa, hvussu laksur verður tilgjørdur aðrastaðni. Eg havi roynt at gjørt eitt rímiliga breitt úrval av laksarættum, sum eg metti kundi verið spennandi fyri føroyingar, sigur Kjetil Gundersen.

Hann letur ógvuliga væl at føroyska laksinum, ið hann heldur standa mát við laks aðrastaðni í heiminum.

–Í Norra hevur tað verið tungt við at fáa selt laks, men so kom glið á søluna av sushi, og hetta hevur skapt ein stóran eftirspurning. Hóast kokkarnir eru vorðnir troyttir av sushi, so eru fólk sera glað fyri tað. Tað er ofta soleiðis, at kokkarnir eru eitt sindur frammanfyri tíðarrákið. Í størru býunum í Norra er tað útboðið eisini vorðin rættiliga internationalt, har gestirnir kunnu fáa eitt sindur av hvørjum, sigur Kjetil Gundersen.

Sjálvur hevur Kjetil eisini góðar royndir sum kokkur, og hann hevur eisini verið á norska kokkalandsliðnum, ið gjørdist nummar trý við OL-kappingina í 2000. Fyrsta plássið fór til Svøríki, og hetta hóvaði ikki grannunum úr Norra.

Meðan hann hevur verið í Føroyum, hevur hann roynt eitt sindur av mati á føroyskum matstovum, og tær fáa eitt gott skoðsmál frá norska meistarakokkinum.

–Støðið í Føroyum er sum í Oslo. Tað er kanska eitt sindur meira gammeldags í Føroyum og lítið fjøllbroytt, men tað er gott, sigur Kjetil Gundersen.

Um onkur hevur hug til at kunna seg meira um uppskriftir og annað ber til at hyggja á www.seafood.no.

Ungmannafelagið Samband nýggjan formann

Ungmannafelagið Samband skifti á aðalfundi seinasta vikuskiftið formannin og tveir aðrar nevndarlimir

POLITIKKUR
Heri á Rógvi

Á ársaðalfundinum hjá Ungmannafelagnum Samband leygardagin 23. februar blivu tríggir nýggir limir valdir inn í nevndina. Hesi eru Olav Enomoto, Jóhan Petur Johannesen og Eyðna Vidtfeldt.

Michael Jensen, ið hevur verið formaður í fýra ár, stillaði ikki uppaftur til formanssessin. Í hansara stað kom Olav Enomoto, Vestmanna.

Nevndin fekk tveir nýggjar nevndarlimir, eftir at Finnur Jensen og Durita Hansen í ár stóðu fyri valið. Eyðna Vidtfeldt og Jóhan Petur Johannesen eru nýggir nevndarlimir, og frammanundan sita Maud Poulsen og Karina Fagralón í nevndini

Nevndin er skipað soleiðis:
Olav Enomoto, formaður
Jóhan Petur Johannesen, næstformaður
Karina Fagralón, kassameistari
Maud Poulsen, skrivari
Eyðna Vidtfeldt, nevndarlimur

Tiltakslimir eru:
Finnur Jensen og
Michael Jensen

Formaður Sambandsfloksins, Lisbeth L. Petersen, var við á fundinum, har hon legði upp til orðaskifti um løgtingsvalið, ið stendur fyri durðum.

Felagið fyrireikar seg til løgtingsvalið, ið óiva verður sera spennandi, eisini fyri tey ungu. Sjey limir í Ungmannafelagnum Samband eru millum valevni Sambandsfloksins til løgtingsvalið, skrivar felagið í tíðindaskrivi.

–Ungmannafelagið vil framvegis leggja dentin á at fáa enn fleiri ung frammat í politikki, sigur Olav Enomoto, formaður.

Olav Enomoto hevur tikið við sum formaður fyri Ungmannafelagið Samband.
Mynd: Álvur Haraldsen.